


# Mamma Jørgen Frants læt sonin fáa sína grøv



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo




Meinhardt, pápi Jørgen Frants.

Hetta er gravsteinurin hjá Jørgen Frants Jacobsen og pápa hansara Meinhardt. Aftanfyri til høgru hómast steinurin hjá gamla Jørgen Frands.

Tað vanliga í kirkjugørðum er jú, at hjún liggja saman. Tá ið fyrri hjúnarfelagin doyr, verður pláss lagt av til hin.

Hendan grein umrøður tó eina grøv, har faðir og sonur eru grivnir saman. Her er talan um okkara kenda rithøvund Jørgen Frants Jacobsen, sum er jarðaður undir liðini á pápa sínum Meinhardt.

Hetta er ein søga um móðurkærleika. Jørgen Frants var sjúkur leingi, og hann hevur ánað, hvat hetta kundi enda við. Hann sigur ella skrivar, at hann kundi betri forlíka seg við deyðan, um hann varð jarðaður í kirkjugarðinum á Svínaryggi, sum var hansara heimliga umhvørvi.

Tá ið Jørgen Frants doyði í 1938, livdi mamma hansara Marin framvegis. Men í 1935 var nýggi kirkjugarðurin í Havn tikin í brúk. Eftir hetta vórðu bert tey jarðað í gamla kirkjugarði, sum áttu pláss har, og Marin var ein teirra. Maður hennara var longu deyður í 1917 og var jarðaður á Svínaryggi.

Marin vildi fegin ganga hesum ynski hjá soninum á møti. Hon man eisini hava hildið tað vera so óunniligt, at sonurin skuldi jarðast so langt av landi skotin, sum nýggi kirkjugarður tá var. Tískil varð Jørgen Frants jarðaður saman við pápanum. Hetta gjørdi tað eisini munandi lættari hjá Marini at vitja grøvina. Tað er bert eitt hanagleiv frá Grím Kambansgøtu, vanliga kallað Konradsbrekku, har hon búði, niðan í gamla kirkjugarð.

Beint við liggja eisini foreldrini hjá Meinhardt, Hanne f. Raffenberg og Jørgen Frands Jacobsen, sum gjørdist 97 ára gamal. Tey verða umrødd seinni.

Tá ið Marin doyði í 1953, varð hon tískil grivin í nýggja kirkjugarði.

## Um teir báðar kann annars verða sagt:

**Martin Meinhardt Jacobsen** var føddur 4/5-1862 og giftist við Maren Mikkelsen, fødd í Elduvík 18/3-1871. Hon vaks upp hjá Clement Jacobsen úti á Reyni í Havn. Meinhardt var útbúgvin handilsmaður og starvaðist fyrstu árini í Vágsbotnshandlinum, har hann hevði eftirlit við og umsiting av úthandlunum úti á teimum ymisku bygdunum í Føroyum. Hann hevði eisini ábyrgdina av fiskaplássunum úti í Álakeri, har handilin turkaði nógvan fisk.

Seinni tók hann við starvi sum leiðari hjá A.W. Skibsted úti í gomlu handilshúsinum í Tinganesi. Tey seinastu árini handlaði hann saman við verfaðir sínum Clement Jacobsen úti í Tinganesi. Meinhardt doyði 12/2-1917 og Marin doyði tann 17/11-1953.

Børnini hjá Meinhard og Marin vóru umframt Jørgen Frants: Anna Cathrina, Franciska, Hanna, Hella og Klæmint. Bert Klæmint og Hella vóru gift.

Mamma mín og Hella vóru javngamlar. Tær búðu í sama grannalagi. Her spældu tær saman og vóru væl alt lívið.

## William Heinesen sigur millum annað um Meinhardt:

Hans liv var delt mellem arbejde og leg. Men legen var i grunden stedse den vigtigere, den egentlige del, mens arbejdet for det meste formede sig som pligtarbejde. Det kunde naturligvis ogsaa forme sig som en glad og fornøjelig pligt, således når det gjaldt mange beholdningrejser han foretog til forskellige bygder, hvor M C Restorff & Sønner havde filialer eller også når det drejede sig om fisketilvirknings-inspektioner ude i det solbrændte og saltfyldte Aalekjær. Ogsaa den del af det arbejde onkel Meinhardt gennem årende udførte, har han utvivlsomt omfattet med interesse...

Han var en talentfuld og ivrig dilletantskuespiller og repræsenterede på dette felt ogsaa altid den fantasifulde og organiserede impuls. Også litteratur spillede en stor rolle for onkel Meinhardt. Han var sjælen i Thorshavn Læseselskab, der bestod i mange år og anskaffede en række gode bøger og tidsskrifter.

**Jørgen Frants Jacobsen** var føddur 29/11-1900. Aftaná at hava tikið realprógv her í Havn í 1916 fór hann til Danmarkar á Sorø Akademi, har hann gjørdist studentur í 1919 og fór undir at lesa søgu og franskt mál. Á heysti 1922 gjørdist hann tuberklasjúkur og hóast hann var innlagdur á fleiri sjúkrahús og sanatorium, gjørdist hann ongantíð frískur ella raskur aftur. Hann kom tí ikki at taka sítt embætisprógv sum cand. mag. fyrr enn í 1932. Í 1934 varð hann settur í starv á Institut for Historie og Samfundsøkonomi á Lærda háskúlanum í København og skuldi hann í hesum starvi greina viðurskiftini um ”Den grønlandske monopolhandels historie”, og kom hann eisini í hesum sambandi inn á føroysk viðurskifti.

Meðan hann læs í Keypmannahavn, starvaðist hann sum blaðmaður á Politiken, har hann var høgt í metum sum blaðmaður, hóast hann til tíðir kundi hava ein hvassan penn og sína egnu áskoðan um ymisk viðurskifti.

Hann gav út í 1936 bókina ”Færøerne Natur og Folk”, ið skuldi lýsa Føroyar sum ferðamannaland. Í 1939, eftir at hann var deyður, kom út skaldsøgan Barbara, sum skyldmaður og vinmaður hansara William Heinesen skrivaði lidna.

Bókin er eisini umsett til fleiri tungumál og er eisini gjørd til film av dananum Niels Malmros. Seinni eru aðrar bøkur sum Nordiske Kroniker, Dýrmæta lív, sum William Heinesen og Christian Matras hava ritstjórnað, komnar út. Jørgen Frants Jacobsen bar orð fyri at vera ein evnaríkur maður, ið setti sær stór mál. Hesi hevði hann eisini nátt, um hann ikki gjørdist sjúkur á ungum árum og doyði bert 37 ára gamal tann 24/3-1938.

*Keldur:*
*William Heinesen*
*Johan Restorff Jacobsen*
*Súsanna Danielsen*



*Jørgen Frants.*



*Hendan myndin man vera tikin um ta tíðina, tá ið Meinhardt doyr. Aftast frá vinstru eru: Anna Katrina, Marin, Fransiska og Hanna. Frammanfyri Hella og Klæmint.*


Komandi grein:
**Blaðstjórin doyði 16 ára gamal**

Kristoffur Kamban gjørdist bert 16 ára gamal. Hann hevði júst byrjað útgávuna av einum blaði fyri realskúlanæmingar. Tað vóru bert komin trý bløð, tá ið Kristoffur doyði.